Vil seta føroyska flaggið á Mount Everest:

# Onkur sigur eg eri svakur

BRAGDARHUGUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*


*Johnny Joensen avmyndaður nakað uppi á Sornfelli, tá tíðindini spurdust um hansara stóru ferð.*

*Mynd Jens Kr. Vang*

Viðmerkingarnar singla um oyruni á 27 ára gamla Johnny Joensen úr Vestmanna, nú tíðindini um at hann ætlar at seta føroyska flaggið á 8848 metra høga Mount Everest eru 24 tímar gomul. Tey flestu halda, at hetta er ein spennandi setningur hann hevur sett sær, onnur halda hann vera heilt svakan. Men Johnny legur sektin á hvat fólk siga. Hann hevur sett sær fyri at fara á fjøll sum vilja nakað, hann vil annað enn hesar smápirrurnar í Norðuratlantshavi.

Alt hetta liggur tó nakrar mánaðar frammi í tíðini og dagurin í dag snýr seg um nakað heilt annað hjá Johnny Joensen. Hann er staddur á Vestpack í Vestmanna og vit tosa við hann mikumorgun tann næstseinasta í mars. Og í morgun snýr lívið hjá Johnny seg um innkeypsposar til Rúsuna. Tað er hann sum hagreiðir plasti, áðrenn tað fer út í høllina og har verður lutað sundur í passaligar posar, sum kunnu hýsa glitrandi løgi, áðrenn sett verður á heima við hús. Og hendan morgunin ger hann eisini plast klárt til ruskposar hjá KOB og sílaposar til Vestsalmon.

– Eg havi verið djarvur síðan eg var lítil og mær dámar væl at ganga í brattlendi. Vit hava seyð gangandi í Skorunum í Vestmannabjørgunum og har er sanniliga bratt, eg eri vanur at ganga í brattlendi. Men rættiliga fjallaknintring havi eg ikki roynt enn. Eg havi verið á skíferiu í fronsku alpunum, tað er tað nærmasta eg eri komin ordiligum fjøllum, sigur Johnny Joensen.

– Í morgun havi eg ikki hugsað um nógv annað, enn hvussu tað man kennast at standa á heimsins hægsta fjalli.

### Fyrst 7129 metrar

Mount Everest er ein køld majestætisk dama mitt í Himmalaya og niðan á hana fer ein ikki soleiðis uttan víðari, tí fer Johnny ein venjingartúr á eitt lægri fjall sum bara er 7129 metrar høgt. Hetta fjallið eitur Baruntse.

– Baruntse er tekniskt eisini eitt torført fjall, so talan verður ikki um ein vanligan gongutúr. Vit skulu royna okkum í rættuligari fjallaklintring. Túrurin byrjar 30. september í ár og ein máni er settur av til hann. Vit skulu klintra fleiri túsund metrar upp, so tað tekur tíð, sigur Johnny Hansen.

– Munurin millum Baruntse og Mount Everest er luftin. Mount Everest er 1700 metrar hægri og tað telir nógv, tá tú er so nógv uppi. Eg havi ikki skilt, at Mount Everest er torførari at klintra enn Baruntse. Men eg skal fyrst klára Baruntse, áðrenn farið verður á Mount Everest og seinna ferðin verður ein heilt onnur ferð. Hon er dýrari og meira krevjandi við útgerð. Fyrra ferðin fer at kosta um 50.000 krónur og tá er útgerðin ikki tald við. Ferðin upp á Mount Everest fer at kosta omanfyri 100.000 krónur.

– Annars skal eg niður til Danmarkar áðrenn at vera saman við teimum, sum skulu luttaka á ferðini. Vit vera sjey, og eg vit ikki, um vit bara eru mannfólk, ella um onkur kvinna kemur við, sigur hann.

### Vandafull ferð

Mount Everest er ein kørg dama og ikki øll koma livandi frá ferðini niðan á hana. Ofta brestur kavarokstormur á og fjallakrintrarar liggja veðurfastir leingi. Vandi er fyri súrevnistroti og tá býður ikki bøn. Men hetta ræðir ikki Johnny.

– Eg veit hetta er vandamikið, men tað er eisini sjálv avbjóðingin. Eg havi sett mær fyri at seta føroyska flaggið á Mount Everest, og eg ætli mær ikki at taka tað við aftur, hóast dálkingin frá burturkasti frá øllum fjallaklintrarunum er ein umhvørvistrupulleiki í Himmalaya. Tað er eisini vandamikið at ferðast í Nepal fyri tíðina, har eru ótrygg politisk viðurskiftir, men tað ræðir meg heldur ikki. Eg havi ongantíð verið bangin og eg vil royna hetta, sigur Johnny Joensen.

Johnny Joensen er væl fyri likamliga. Hann er ítróttarmaður, spælir hondbólt í løtuni og er nær við at gerast føroyameistari í hondbólti. Hann rør eisini kapp.

– Eg havi ferðast nakað á Cypern, í Egyptalandi í Ísrael og á evropeiska meginlandinum, og tað er útferðarhugurin sum drívur verkið, nú eg eisini skal til Nepal, sigur hann.

Føroysku fjøllini kunnu nýtast til tekniska venjing, men ikki til ísklatring. Tí føroyski ísurin er alt ov leysur.


*Her er Baruntse, fjallið Johnny skal niðan á áðrenn hann fer á Mount Everest*

# Bilar

Nr. 56 • hósdagur • 21. mars 2002 • 76. árg.

# Størri og rúmligari VW Polo

**Teir fyrstu VW Polo, av nýggjasta modellinum, eru nú komnir til landið. Í stødd nærkast Polo nú VW Golf og er á leið somu stødd sum Golf II, ið kom á marknaðin í 1984, nú hann er longdur við 15 sentimetrum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*


*Her er Lars Egemose, sølumaður hjá Bilasøluni v/ Øssur Johannesen, við nýggja VW Polo. Bilurin fæst í fleiri útgávum við 3 og 5 hurðum*

Talan er um ein rúmligan bil, ið er bygdur yvir sama plattform sum Skoda Fabia. Koyrieginleikarnir eru sera góðir, og lítið hoyrist til motorin inni í bilinum. Innan minnir hann nógv um VW Golf, hvat viðvíkur instrumentborðinum og setrunum. Litirnir innan hóska til lakkeringina uttan.

### Elektrohydrauliska servostýring

Allir útgávurnar hava elektrohydrauliska servostýring sum standard. Fyrimunurin við hesi servostýring er at hon lagar seg til ferðina og hvussu bilurin er lastaður. Tað vil siga at lægri ferðin er og meira bilurin er lastaður, lættari verður stýringin. Hægri ferðin er, og minni bilurin er lastaður, tyngri verður hann at stýra, soleiðis at bilførarin altíð hevur best møguliga føling við vegnum. Bremsurnar og fjaðraskipanin virka heilt optimalt.

### Trygdin

Trygdin er eisini á høgum støði, sum t.d. ABS bremsur við elektroniskum bremsukraftdeilara, elektroniska stabilitetsskipan (ESP) sum hjálpur bilføraranum í kritiskum situatiónum, airbag framman og í síðunum. Bilurin er vorðin 45 prosent sterkari við ein síðusamanstoyt. Sum nakað nýtt í hesum klassanum kann rættið stillast bæði í hædd og út og inn. Við ein samanstoyt verða bensinpumpan, servopumpan og el-varmalikam automatiskt avbrotin, samstundis sum ljósið í kabinuni verður tendrað og sentrallásið verður læst upp, um tað er læst.

### 3 og 4 syl. motorar

Motorskráin býður uppá bensin og dieselmotorar við 3 og 4 sylindarum. Fyrimunurin við 3 syl. motorum er at teir eru léttari og hava minni friktión, við tí úrsliti at teir brúka minni brennievni. Bensinmotorarnir fáast úr 55 til 101 hk og dieselmotorarnir úr 64 til 101 hk.

### Plus pakkin

Sum nakað nýtt eru viskararnir gjørdir úr gummi, t.v.s. eisini tað sum viskaragummiið er heft í. Hetta ger at viskararnir larma minni enn vanligt. Til allar útgávurnar fæst ein "Plus pakki" sum umfatar t.d. síðuspegl við hita, sentrallas, el-síðurútar framman, 3 nakkapútar aftan, koyriteldu o.m.a. Eykakostnaður fyri Plus pakkan er 5.000 krónur. Bilurin kann síggjast og roynast á bilasøluni hjá Øssur Johannesen.

## VW Polo 1,4 TDI 3 syl. diesel

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.4 litur 3 syl. diesel 75 hk |
| 0-100 km/t | 13,6 sek. |
| Oljunýtsla | 21,7 -22,7 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 165/70-14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 389,7 cm |
| Breidd | 165,0 cm |
| Hædd | 146,5 cm |
| Eginvekt | 1050 kg |
| Viðførisrúm | 270 / 1030 litrar |
| Prísir | Bensin, frá kr. 143.000,-<br>Diesel, frá kr. 159.000,- |
| Søluumboð | Bilasølan v/ Øssur Johannesen<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>tel. 315354<br>www.audi-vw.net |


*Tað at nýggi VW Polo er 15 cm longri enn forgangarin, gevur nógv betur pláss til tey ferðandi, bæði framman og aftan*


*Innan er alt í besta VW stíli. Sum nakað nýtt í hesum klassanum kann rattið stillast bæði í hædd og út og inn*